Úr grannalondum

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

# Samgongan tódnað



***Lilja Mósesdóttir og Atli Gíslason***
*Mynd: Vísir*

Íslendska stjórnarsamgongan tódnaði eitt sindur um vikuskiftið, tá tveir tinglimir hjá teimum vinstragrønu fóru burtur úr alttingbólki floksins, samstundis sum tey kunngjørdu, at tey ætla sær ikki at styðja stjórnina.

Lilja Mósesdóttir og Atli Gíslason kunnu ikki taka undir við fíggjarpolitikkinum hjá stjórnini, og tey eru heldur ikki nøgd við framferðina í sambandi við Icesave-málið. Ein annar trupulleiki er umsóknin um limaskap í ES.

Íslendska stjórnin hevur nú 33 av teimum 63 altingslimunum aftan fyri seg.

# Óttast olju-dálking við Jan Mayen

Norski umhvørvisstovnurin ivast í, hvussu skilagott tað er at fara undir at bora eftir olju við Jan Mayen. Stovnurin vísir á, at ætlanin er at bora einans 15 fjórðingar úr landi, og at eitt óhapp við leka kann fáa sera álvarssamar avleiðingar fyri tað ríka fugla- og sjódjóralívið umframt fiskastovnarnar, sum halda til har.

Umhvørvisstovnurin sigur, at eingin útgerð er á Jan Mayen, sum kann forða fyri oljudálking, og at tað fer at taka nakrar dagar at flyta útgerð úr Noregi. Tí mælir stovnurin myndugleikunum til at kanna, hvat kann gerast fyri at forða dálking av einum møguligum borióhappi.

# Blaka toskin útaftur

Danskir bátar, sum royna við troli eftir hummara og tungu í Skagerak, fáa nógv meiri tosk í trolið, enn teir hava loyvi til at fiska, og tí enda 40 prosent av toskinum aftur í havinum.

Toskastovnurin í Skagerak er illa fyri, og donsku bátarnir hava bara loyvi at fiska 2.000 tons í ár. Men royndir vísa, at bátarnir fáa umleið 3.400 tons, og at teir tí noyðast at blaka umleið 1.400 tons útaftur.

Danska fiskimannafelagið viðgongur útblakingina, men uggar seg við, at útblakingin er størri í hinum ES-londunum.

# Jóhanna er ikki álitið longur

## Aftan á bankakreppuna í Íslandi á heysti í 2008 hildu flestu íslendingar, at Jóhanna Sigurðardóttir var tann rætta at leiða landið burtur úr ruðuleikanum. Men síðani er nógv broytt

Ikki minni enn 63,6 prosent av veljarunum søgdu seg tá hava álit á henni. Men nógv er hent síðani, og í einari nýggjari meiningakanning siga bara 16,9 prosent, at tey styðja hana. Fallið er tó ikki komið brádliga, tí longu í mai í fjør vóru tað bara 25,3 prosent, sum styðjaðu hana.

Heldur ikki Steingrímur J. Sigfússon, fíggjarmálaráðharri, er so væl umtóktur, sum hann var. Hann kann tó ugga seg við, at hann er betur umtóktur enn forsætisráðharrin, tí í teirri nýggju kanningini siga 22,3 prosent seg hava álit á honum. Tað talið var 37 prosent í mai í fjør.

Harafturímóti er Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, betur umtóktur nú enn fyri einum lítlum ári síðani. Tá søgdu 26,7 prosent, at tey styðjaðu hann, men nú siga 41,7 prosent, at tey eru nøgd við forsetan og styðja hann.



***Jóhanna Sigurðardóttir***
*Mynd: Morgunblaðið*

# Grønlendingar í Danmark ein gloymdur minniluti

## Nógv verður gjørt burtur úr teimum ymsu minnilutunum í Danmark og teirra støðu í tí danska samfelagnum. Men tann grønlendska minnilutan hoyrist einki um

Ein bólkur av lesandi á lærdaháskúlanum í Roskilde hava nú sett sær fyri at kanna trivnaðin hjá grønlendingum, sum búleikast í Danmark.

– Tað er umráðandi at lýsa samleikakensluna hjá grønlendingunum í tí samfelagnum, sum teir búleikast í, sigur Gitte Mikkelsen við danska kringvarpið. Hon er ein av stigtakarunum til kanningina. Sjálv heldur hon, at grønlendingar eru ein gloymdur minnilutabólkur í Danmark.

Gitte Mikkelsen vísir á, at grønlendingar hava danskan ríkisborgararætt, og tí hava teir onnur rættindi og onnur krøv enn fólk úr øðrum minnilutum. Eftir hennara tykki er neyðugt at varpa meiri ljós á grønlendingar í Danmark og umstøður teirra.

- Grønlendingar eru ein gloymdur bólkur. Alt ov nógv verður gjørt burtur úr øðrum minnilutum, sigur Gitte Mikkelsen við DR.



# Politikari tók myndir av naknum monnum

Fyrradagin fylti norski kommunupolitikarin Trond Birkedal 31, men føðingardagin mátti hann halda í varðhaldinum í Stavanger, og har skal hann eisini sita teir næstu 14 dagarnar. Orsøkin er, at Trond Birkedal hevur tikið myndir av monnum, meðan teir vóru naknir, men sum ikki vistu, at hann hevði eitt fjalt myndatól í baðirúminum.

Løgreglan fekk fyrst fráboðan frá einum manni, sum var vorðin avmyndaður nakin, men í morgun høvdu seks mans vent sær til løgregluna við somu ørindum.

Trond Birkedal er kommunupolitikari í Stavanger fyri Framburðsflokkin.